# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Flott men ikki nokk

**Mann fyri mann spældi EB/Streymur ein rimmardyst, men sum lið vantaði tað síðsta fyri at knógva sterka finska liðnum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Tað sást, at Marni Djurhuus hevur altjóða royndir og saman við Símuni Eliasen taldist hann millum bestu menninar á vøllinum*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

1-1 javnleikur í fyrstu altjóða avbjóðingini nakrantíð. Í sjálvum sær eitt heiðurligt úrslit, men EB/Streymur hevur grund at iðra seg. Við teprum 1-0 tapi á útivølli vóru fortreytirnar til seinna dystin liðanna millum góðar. Og EB/Streymur spældi eisini síni kort væl fyrra hálvleik. Teir hildu MyPa frá teimum stóru møguleikunum, vóru vælskipaðir í verjupartinum og hildu nullið allan fyrra hálvleik.

Soleiðis livdi vónin enn, tá menn komu út til seinna hálvleik. Og neistin kveiktist av álvara, tá Hans Pauli Samuelsen bara fimm minuttir inn í seinna hálvleik vann sær eitt uppiborið brotsspark. Stóribeiggi Ronnie Samuelsen var settur at taka sær av hesum, men hann sendi bólt og málverja sama veg.

Aftaná tók MyPa yviraftur á sama hátt, sum teir gjørdu í fyrra hálvleiki. Teir høvdu bóltin stóran part av tíðini, men langt var millum heilt stóru kjansirnar. Fyri tað mesta var tað við skotum úti frá, at teir royndu seg, men tá vísti René Tórgarð at hann ikki er hvør sum helst í málinum.

### Sløktu neistan

20 minuttir fyri leiklok gav trýstið úrslit hjá MyPa. EB/Streymur misti bóltin í teirra vinstru síðu og so gekk skjótt. Bólturin varð fluttur tvørtur um vøllin í hitt borðið, síðani lagdur skrátt aftur, soleiðis at ein finni skamt uttanfyri brotsteigarmarkið kundi senda eitt hart og flatt skot undir René Tórgarð og í málið. Nú var kravið trý mál til EB/Streym, um teir ætlaðu sær víðari, og við so sterkum mótstøðumonnum var uppgávan ógjørlig.

### Frígjørt eftir málið

EB/Streymur, sum inntil nú hevði hugsað einamest um verjupartin, fór nú longur fram á vøllin. Hesar síðstu tjúgu minuttirnar vísti EB/Streymur, at teir eisini kunnu bjóða av frameftir í altjóða fótbólti. Spælið gjørdist onkursvegna meiri frígjørt nú, teir skaptu nakrar hampiligar møguleikar, og fýra minuttir fyri leiklok skoraðu teir fyrsta altjóða málið nakrantíð.

Innskifti Hanus Eliasen setti fleiri mans av sær, áðrenn hann úr høgru legði ein vala bólt innfyri, har nýggi áleyparin, sum avloysti annars anonyma Arnbjørn Hansen, kom stórleypandi við handaru stong og fekk so ella so trampað bóltin í kassan.

Stutt aftaná eftir hornaspark hevði Hanus Eliasen ein rimmar møguleika, tá hann beint undir málinum gjørdist púra leysur, men tíverri fór stútarin upp um.

Nakað seinni bríkslaði dómarin dystin av, og harvið endaði altjóða ævintýrið hjá EB/Streymi á hesum sinni. Samanlagt taptu teir 2-1, og samanumtikið kunnu teir eisini vera nøgdir við debutina á altjóða pallinum– tað var flott, men ikki nokk. Mann fyri mann kunnu teir vera vælnøgdir, men sum lið vantaði tað síðsta.

## B36 tapti 3-2

**Aftan fyri 2-0 megnaði B36 at vinna seg upp á javnt, men løtu seinni skoraði Ekranas sigursmálið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í B36 iðraðu teir seg um, at úrtøkan yvir tveir dystir ikki gjørdist betri enn 0 stig og samanlagt 3-6 tap, tá teir í gjár spældu seinna dystin móti litaviska Ekranas.

Í seinna dystinum, sum varð liðugt spældur fyri hálvum tíma síðani, stóð á jøvnum í hálvleikinum. Eisini hóast havnarfelagið helt seg hava betri uppiborið. Veruligar opnar møguleikar gjørdist talan sjáldan um, men gestirnir úr Havn høvdu tó greiða yvirvág í spæli.

Tíðliga í seinna hálvleiki vann Ekranas seg upp á 2-0, men við einum máli frá Bergi Midjord og einum brotsspark frá Fróða Benjaminsen fekk B36 aftur nakað av spenningi íaftur. Eisini hóast hetta kravdi enn tvey mál frá teirra síðu.

Løtu seinni fekk heimaliðið tó seinasta málið í dystinum, og so mátti B36 ásanna, at europiska ævintýrið í ár endaði uttan stig av nøkrum slag.

Tíðin at iðra seg er tó stutt. Longu sunnudagin byrjar landskappingin aftur, og har hevur B36 sítt at síggja til í oddastríðnum, sum nú fyrst og fremst er móti NSÍ.

# Føroyar skulu stríðast við Ísland

**Í gjárkvøldið tapti U-17 landsliðið tapt 2-0 móti Belgia, og harvið er greitt, at Føroyar leygardagin skulu spæla móti Íslandi um 7. Plássið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyska U-17 landsliðið fekk einki stig burtur úr innleiðandi umfarinum í NM, sum í hesum døgum er í Jyllandi, og tað eydnaðist heldur ikki at skjóta nakað mál. Tað varð endaliga staðfest, tá ið Føroyar í gjárkvøldið taptu 2-0 móti Belgia. Málini vórðu skorað í 24. og 27. minutti eftir innlegg úr høgru.

Føroyar vóru nær við at fáa mál, Men eftir horna og roynd við høvdinum brast bólturin í tvørtræið. Í trettan minuttir vóru Føroyar undirmannaðar, tí Monrad H. Jacobsen í 67. minutti fyri aðru ferð sá gult og harvið reytt.

Belgia vann bólkin við 7 stigum, Noreg fekk 6 stig, Danmark 4 stig og Føroyar 0 stig. Leygardagin klokkan 11 skulu Føroyar á Hedensted stadion spæla um 7. plássið ímóti Íslandi, sum endaði aftast í hinum bólkinum.

Hesa ferð var føroyska liðið soleiðis mannað: Teitur Gestsson, KÍ - Monrad H. Jacobsen, NSÍ, Sørmund Kalsø, KÍ, Viljormur Davidsen, NSÍ, Dánjal Pauli Lervig, KÍ - Jógvan Rói Davidsen, HB, Heini Vatnsdal, VB/TB (Hallur Hansson, HB, 57.), Karl Løkin, NSÍ (Eli F. Nielsen, FSV04, 73.), Bjarti Hansen, FSV04 (Hanus Mortensen, VB/TB, 55.), Róaldur Jacobsen, B36, Jóan Símun Edmundsson, B68 (Jens M. Jensen, EB/Streymur, 79.).

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Thomas J. Thomsen, HB, Kristin R. Mouritsen, HB, Mikal Jespersen, VB/TB.

Venjarar eru Pætur S. Clementsen og Finn Johannesen.